gult10 cyan10 magenta10 svart10

Í Býin

Casablanca fær nýggjan ham

Um nakrar vikur fer fyrrverandi náttklubbin Casablanca at lata upp í nýggjum hami. Í framtíðini verður hølið í kjallaranum í Tórsgøtu 11 tónleikakafé og matstova í einum og í hesum sambandi verður nýggju køkur settur upp

Arbeiðsmenn hava úr at gera í Casablanca í hesum døgum. Mouldi Manai hevur sett teir til at umbyggja hølini, so at Casablanca í framtíðini verður tónleikakafé og matstova í einum ístaðinfyri náttklubbi

Mynd: Jens Kr. Vang

MATSTOVA
Stefan í Skorini

Hesar seinastu dagarnar hava menn arbeitt dúgliga í fyrrverandi náttklubbanum Casablanca. Hølini verða umbygd, tí náttklubbin skal nú gerast til tónleikakafé og matstovu í einum. Gamla navnið Casablanca Nightclub verður nú broytt til Casablanca music café.

Mouldi Manai, eigari av Casablanca, sigur, at ætlanin er, at umbyggingin verður liðug einaferð fyrst í mai mánaði. Enn er dagurin, tá latið verður upp, ikki fastlagdur. Mouldi væntar eisini, at tey fara at skipa fyri onkrum serligum, tá nýggja tónleikakaffistovan letur hurðarnar upp á fyrsta sinni.

Nýggja Casablanca fer at hava opið hvønn gerandisdag frá klokkan 11 á morgni til á midnátt. Í vikuskiftinum verður opið heilt til klokkan fýra um náttina.

Stórt úrval

Í bygninginum í Tórsgøtu hevur Mouldi havt trý ymisk støð, har fólk kunnu koma at stytta sær stundir ella fáa sær ein góðan bita og okkurt svalandi at drekka. Matstovan Rio Bravo hevur fleiri ár á baki, meðan Casablanca og pubbin Manhattan eru komin afturat seinni.

Mouldi sigur, at hann hevur lagt seg eftir at kunna hava eitt stórt úrval og fleiri valmøguleikar at vísa á, tá fólk koma á gátt hjá honum.

– Tá fólk velja at koma her, skulu øll hava ein møguleika at hugna sær onkursvegna, sigur Mouldi Manai, ið samstundis vísir á, at um fólki ikki dámar at vera í einum staði, so ber altíð til at fara víðari til tað næsta.

Hugskotið er, at fólk kunnu ferðast ímillum tey ymisku støðini, sum tó eru undir somu lon.

Tí verður skipað soleiðis fyri, at trappur eru ímillum Casablanca, Manhattan og Rio Bravo. Soleiðis kunnu fólk fara úr einum staði í eitt annað uttan at fara útum fyrst.

Tað verður ikki sama slag av mati, ið borðreitt við verður í Casablanca og í matstovuni Rio Bravo. Í Casablanca verður alt annað enn kjøtrættir serverað. Tað er sostatt ein lættari matarskrá, sum verður at fáa í Casablanca enn í Rio Bravo.

Tað er eisini ein lættari og frískari stílur, sum kann upplivast í Casablanca. Mouldi sigur, at tey fara at bjóða fólki livandi tónleik, men tó verður eisini diskotekstónleikur framhaldandi at hoyra.

Casablanca fer við hesum nýggja átakinum at dyrgja eftir einum meira tilkomnum kundaskara, men tó leggur eigarin dent á, at øll eru vælkomin. Mouldi vil fegin hava gestir, ið virða tað arbeiði, sum liggur aftanfyri.

Skiftandi tíðir

Um orsøkina til, at Casablanca nú fær nýggjan ham, sigur Mouldi, at tíðirnar broytast, og tað krevur endurnýggjan av og á. Hann vísir á, at fyri framman stendur ein oljuvinna og ferðavinnan vindur meira uppá seg. Tí hevur hann góðar vónir til nýggja Casablanca.

– Vit hava upparbeitt eitt andlit úteftir í Føroyum og hesum arbeiða vit nú víðari við, sigur Mouldi Manai.

Mouldi greiðir víðari frá, at hann uttanlanda javnan hevur sæð tónleikakafé og matstovu í einum. Hetta dámdi honum avbera væl, og tí vil hann eisini royna tað her í Føroyum.

Tað er fyrstu ferð, at nakar roynir at samansjóva hesi bæði í Føroyum, og tí er tað eitt spennandi tiltak.

gult11 cyan11 magenta11 svart11

Í Býin

Kaggin
Hetta vikuskiftið
Spæla
Kaggin R.N.G.n Kaggin Kaggin Kaggin
www.kaggin.fo

Á matarseðlinum
HEITIR RÆTTIR
Lasagna w/ oksakjøti 49,-
Frikadellur w/ epla søsi & tza tzi ki / w/ eplasalat & reyðkáli 49,-
Bakað epli w/ tunsalati / w/ tza tzi ki / w/ avocado dip 45,-
OMANÁ
Pannuloskur w/ fei ella rómu 25,-
Coffee Choc 25,-
Vit selja allir rættir út úr húsinum
Ibendi sinkiku
café DETTUR
Tlf. 31 20 26

Felagið Tórshøll
Hvørt fríggjakvøld, leygarkvøld og sunnukvøld er livandi tónleikur
Nú fleiri ódyrar eindir allar dagar
Felagið Tórshøll Sverrigsgøta 22 Tlf. 31 16 86

JOHN's RESTAURANT
Fríggjadag & leygardag
Jura Steak w/ bakaðum epluum 145,-
Eisini hava vit Spesialitetir á matarseðlinum
Opið er hvern dag frá kl 11.00 - 22.00
Tó fríggjadag og leygardag til kl. 23.00

Njótið matin í okkara friðsæla og hugnaliga umhvørvi
HOTEL HAFNIA
Hotel Hafnia
Áarvegur 4-10 • Postbox 107
110 Tórshavn
Tlf. 31 21 33 • Fax 31 52 50
www.hafnia.fo

Sosialurin fer í býin hvørja viku

Í Býin
- hvønn hósdag

HESA VIKUNA
Otter í Funnings. Hósskvøldið
14,95 pr. eind frá 21.00 til 22.00
Otter í Funnings. Fríggjakvøldið
ladies night
14,95 pr. eind frá 22.00 til 24.00
Martin Kjærbo Leygarkvøldið
14,95 pr. eind frá 22.00 til 24.00
Sunnukvøldið -KARAOKE-
kl. 21.00
FÓTBÓLTUR Á STÓRSKJØGGJA
Manchester United Vs. Manchester City
leygardagin kl. 12.00 á stórskjáinum
Club 20 Café
Piparbúffur bert
v/salat, chips & piparsós
69,-
Discoteque Club 20
Tinghúsvegur • Tórshavn • Tlf. 31 55 28
www.club20.fo

Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu

Manhattan
Fríggjakvøldið 20/4
Livandi tónleikur
Sámal & Bonnie
Manhattan

AUTO
-Dag sum nátt-
-skjótt og gott-
BENZIN
DIESEL
KIOSK
-ALT DØGNIÐ-
Skal tú bil hýra
-so er tað 311234
AUTO
311234

Sosialurin fer í býin hvørja viku og tú sleppur at fylgja við hvussu hetta spælir av
Les í býin

fk Matseðilin